# VÍF-KVINNURNAR SPÆLA SUM EINGLAR

Tíðindi / By VÍF

Tað er veruliga vorðið stuttligt at hyggja kvinnuhondbólti í Vestmanna í hesum døgum. Tað man vera langt síðani, at vit hava havt eitt so vælleikandi kvinnulið, og tað er ein fragd fyri eyga at síggja kvika og ágrýtna spælið, har tær gera sítt ítarsta allar 60 minuttirnar. Tær spæla sum einglar. Tær møðast ikki, og Geir Wardum skal hava alt tað rós, sum henda telda kann skriva, fyri at hava fingið tað besta burtur úr hvørjum tí einasta leikara. Tær eru allar við, bæði tær heilt ungu og tær royndu. Og hóast tær leika móti leikarum, sum í nógvum førum eru størri og sterkari, roynist kvika og kimiliga spælið so væl, at tær eru ikki til at steðga. Og lat okkum so eisini minnast til at fegnast um ta spæligleði, sum lýsir av teimum undir dystunum.

Móti Stjørnuni sunnudagin løgdu tær seg á odda beinan vegin. Støðan gjørdist 3-0, 8-3, 14-5 og tá hálvleiksstøðan var 19-9, var dysturin langt síðani avgjørdur.

Stjørnan fekk ikki nógv burtur úr seinasta kappingarár, men Stjørnuliðið í ár er ikki nakað vánaligt lið. Har eru fleiri góðir leikarar og málverjin er somuleiðis góður. Men VÍF var betri henda dagin, nógv betri, hóast Stjørnan í seinna hálvleiki royndi at gera ein lítlan vørr. 22-9, 31-14 og endaliga støðan 38-20 vísir, at VÍF-kvinnurnar verulig býta frá sær.

VÍF-Stjørnan 4.okt 15

*Mynd lænt frá Jens Kr. Vang*

Heilir nýggju leikarar komu á máltalvuna, og tað sigur nógv um breiddina. Tær leika eisini longu sum eitt væl samanspælt lið, ikki sum einstaklingar, hóast tær einans hava leikt tveir landskappingardystir. Hetta sóu vit ikki minst í dystinum á Skála móti StÍF. Í dystinum móti Stjørnuni mundi helmingurin av málunum koma í skjótálopum, har tað serliga var Agnas Olsen, sum alla tíðina var klár at fiska leysar bóltar og renna klaksvíksgenturnar umkoll.

Serliga eyðsýndar vóru eisini Marianna H. Jacobsen og Liljan Djurhuus, bæði sum viðspælarar og sum toppskjúttar, hóast tær vóru vardar úti á vøllinum stóran part av øðrum hálvleiki.

Stóra styrkiroyndin hjá VÍF kvinnunum verður komandi sunnudag móti Kyndli í høllini í Havn. Tá fara vit øll til Havnar at stuðla teimum frá fyrsta bríksli.

**VÍF:** Kristina Griksaite, Agnes Olsen 7, Brynja Jógvansdóttir 1, Annika Poulsen, Liljan Djurhuus 8, Beinta Sveinbjørnsdóttir 2, Marianna H. Jacobsen 9, Elin M. Stórá, Randi Virgarsdóttir 2, Daniella Joensen 4, Ronja Johannesen 1, Kathe Frederriksen, Lív Ingorsdóttir, Eilin Hansen 4 og Rakul Joensen.

**Stjørnan:** Ralulca Ungureauv, Raria Nesá, Durita Thomsen 5, Una Váðklett 1, Krristina Poulsen 1, Paula Leivsgarð, Ella Petersen 1, Jansy Jacobsen 1, Tóra Eliasen 2, Jórunn Nielsen 2, Marta Betric 3, Edel Hansen 2 og Simona Florea 2.

**Dómarar:** Gert Hansen og Arnar Dam

IMG_9067

**Hvonnliðið hjá VÍF:**

**Aftast frá vinstru:** Vivian Petersen, Annika Poulsen, Beinta S. Poulsen, Randi Virgarsdóttir, Ronja Johannesen og Rakul Joensen. **Mittast frá vinstru:** Jóhan Lind Poulsen, Lív Ingdorsdóttir, Kathe Fredriksen, Elin Maria Stórá, Eilen Hansen, Liljan Djurhuus, Agnas Olsen, Kristina Griksaite og Geir Wardum. **Fremst frá vinstru:** Brynja Rógvadóttir, Marianna Holm Jacobsen og Daniella Joensen.

← Previous Post    Next Post →

Search …

## RECENT POSTS

Onki virksemi hjá VÍF í høllini – fyribils til 11. august

Venjarar settir til komandi kappingarár!

Ársaðalfundur 2020

Frálíkur tónleikur á keiini í Vestmanna

Corona – onki virksemi í høllini fyribils

## RECENT COMMENTS

## ARCHIVES

August 2020
July 2020
May 2020
March 2020
January 2020
December 2019
October 2019
July 2019
May 2019
April 2019
March 2019
December 2018
October 2018
September 2018
August 2018
April 2018
March 2018
February 2018
January 2018
December 2017
November 2017
October 2017
September 2017
October 2016
September 2016
June 2016
May 2016
April 2016
March 2016
February 2016
January 2016
December 2015
November 2015
October 2015
September 2015
August 2015
May 2015
April 2015
March 2015
February 2015
January 2015
December 2014
November 2014
October 2014
September 2014
August 2014
May 2014
April 2014
March 2014
February 2014
January 2014
December 2013
November 2013
October 2013
September 2013
August 2013
July 2013
June 2013
May 2013
March 2013
February 2013
January 2013
December 2012
November 2012
October 2012
September 2012
August 2012
July 2012
June 2012
May 2012
April 2012
March 2012
February 2012
January 2012
December 2011
November 2011
October 2011
September 2011
August 2011
July 2011
June 2011
May 2011
April 2011
March 2011
February 2011
January 2011

## CATEGORIES

Badminton
Hondbóltur
Kapproður
Søga
Tíðindi
Tiltøk
Uncategorized

## META

Log in
Entries feed
Comments feed
WordPress.org

We use cookies on our website to give you the most relevant experience by remembering your preferences and repeat visits. By clicking "Accept", you consent to the use of ALL the cookies.
Cookie settings ACCEPT